# Heimarøktin í Norðoyggjum

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til Heimarøktina í Norðoyggjum, frá 15. mai til 30. september. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrasystrar, heilsuhjálparar og heimahjálparar.

Heimarøktin fevnir um alla heimahjálp og heimasjukrarøkt í Norðoyggjum og eitt Eldrasambýli. Arbeitt verður frá kl. 18.00 til 23.00 úti og alt døgnið í Eldrasambýlinum. Arbeitt verður í skiftandi vaktum inni í Sambýlinum.

Av tí at ein av okkara heimasjúkrasystrum skal í farloyvi frá 1. apríl verður hennara starv leyst frá 1. apríl til 31. juli og møguleiki er at halda áfram, sum avloysari til 30. september.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisatón verður at senda til økisleiðaran í Heimarøktini í Norðoyggjum, Bøgøta 34, 700- Klaksvík

Umsóknarfreist fyri summarfrítíðaravloysarum 2. apríl 2001.

Umsóknarfreist fyri farloyvi og avloysara 26. mars.

# Fakligur skrivari til sjúkrasystrafelag Føroya

Søkt verður eftir fakligum skrivara til skrivstovu felagsins at byrja 1. apríl 2001, ella eftir nærri avtalu, til 31. mars 2002.

Okkum tørvar eina sjúkrasystir, sum
- hevur áhuga at verða við til av menna Sjúkrasystrafelagið bæði yrkisliga og fakfelagsliga
- hevur holla vitan um heilsu- og sjúkrarøkt
- møguliga hevur víðari útbúgving
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni

Starvið er uppá niðursetta tíð.

Nærri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til forkvinnu felagsins á tlf. 311309

Umsókn við avriti av prógvi og autorisatión, skulu verða felagnum í hendi 23. mars kl. 14.00.

Sjúkrasystrafelag Føroya

# Ársaðalfundur

Kongshavnar Kvinnufelag hevur ársaðalfund týsdagin 27.03. kl. 20.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Verkstaðsfólk

Verkstaðið hjá Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir dugnaligum verkstaðsfólki.

**Vit bjóða**
eitt starv við nógvum ymiskum arbeiðsuppgávum í einum sera spennandi umhvørvi. Góðar arbeiðsumstøður á einum verkstaði við sera góðari útgerð.

**Arbeiðsuppgávur**
Fyri tað mesta er talan um umvælingar av amboðum og maskinum hjá kommununi. Tó eru eisini nakrar uttandura arbeiðsuppgávur.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin má vera handaligur og hava hollar royndir sum smiður/mekanikari. Neyðugt er at umsøkjarin hevur førarabræv yvir 3500 kg.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Tórshavnar kommunu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Peter Seloy, støðleiðara, tlf. 31 48 81, ella Símin Jákup Hansen, verkstaðsleiðara, tlf. 31 92 43.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar sløkkiliði, postrúm 3240, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25. mars 2001.

SNARSKIVAN

# Longur opið á
## Kommunalu Brennistøðini

Endamálið við at hava opið longur, er at lættari skal verða at sleppa av við burturkast.

Jarn frá vinnuvirkjum og bilvrak verður ikki móttikið leygardag.

**Opið er hvønn leygardag frá kl. 13.00-17.00.**

Umframt er opið:
mánadag, mikudag og fríggjadag: **kl. 08.00-17.00**
týsdag og hósdag: **kl. 08.00-20.00**

Tórshavnar kommuna

Kommunala Brennistøðin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Stuðulspedagogar

Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir stuðulspedagogum til stuðulsfólkaliðið.

**Starvið**
Søkt verður eftir stuðulspedagogum til Familjudeildina og Serdeildina í Stuðulsfólkaskipanini.

Í Serdeildini er talan um børn og ung, ið eru tarnað orsakað av breki ella sjúku, meðan Familjudeildin tekur sær av børnum og ungum, ið hava aðrar trupulleikar.

Stuðlarnir taka sær av uppgávum við børnum og ungum (0-18 ár) á dagstovni, í frítíðaransingini, í heimum og í Bridgehúsinum - eitt stuðultiltak fyri børn og ung undir serdeildini.

Søkt verður eftir fólki til báðar deildirnar at loysa bæði størri og smærri fjølbroyttar og áhugaverdar uppgávur.

**Eisini sóknast vit eftir t.d. lærara- ella pedagoglesandi, ið eru áhugað at hava eina tímalønta uppgávu seinnapartar á degnum, uml. 10 t. um vikuna.**

**Førleikakrøv**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið
- hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum, við serligum tørvi
- er búgvin, torir at tosa um forðingar í arbeiðnum og er opin fyri menning í arbeiðnum

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Stuðlarnir verða settir í stuðulsliðið at loysa eina ella fleiri uppgávur og arbeiðstíðin kann vera full ella part tíð.

Sum liður í arbeiðnum verður skipað fyri ráðgeving og skeiðvirksemi.

Størvini verða sett skjótast til ber og móti sumri, tá onkrir stuðlar fara undir útbúgving.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara í stuðulsfólkaskipanini, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25. mars 2001. Viðmerk á umsóknina "Stuðulspedagogur".

SNARSKIVAN



**Maskinmeistaraskúlin**
**Undir Krákugjógv 5**
**FR-100 Tórshavn**
**Føroyar**
**Tlf. +298 312661 Fax. +298 318545**

# Skeið í Skipaðum Viðlíkahaldi

**verður á Maskinmeistaraskúlanum í viku 18**

**Skeið 1: Amboð til skipað víðlíkahald**

Málsetningur:
Luttakarin fær nágreiniligt innlit í teim ymisku viðlíkahaldshættunum umframt stýring av viðlíkahaldi. Eisini verður dentur lagdur á týdningin av góðum eftirlitshættum og nýtslu av røttu amboðunum, bæði innan hardware- og software. Ymisk mynduleikakrøv verða umrødd. Skeiðið er ein partur av fyrireikingini til »European Expert in Maintenance Managemen«.

Innihald:
Benchmarking, Viðlíkahaldshættir
Viðlíkahaldsstýring: Manuelt og Teldubasera
Sýn og Trygd, Klassing og revisión
NDE-amboð.
Í skeiðinum inngongur projektarbeiðið.

Skeiðið er fyrsta av trimum hvørs heiti er:
Mál og strategi í viðlíkahaldi
Total Productive Maintenance — TPM

Fortreytir:
Útbúgving sum maskinmeistari, verkfrøðingur e.t.
Skeiðið verður hildið við skeiðleiðara frá Fredericia Maskinmesterskole.

Skeiðstað: Maskinmeistaraskúlin, Undir Krákugjógv 5.
Luttakaratal: Í mesta lagi 10.

Dagar: 5 dagar, 30. apríl — 4. maj 2001
Kostnaður: kr. 9.000,-

Tilmelding í seinasta lagi mikudagin 18. apríl 2001 á tlf. 312661 ella fax 318545

# Føroya Lastbilafelag

Ársaðalfundur verður hildin í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini í Runavík leygardagin 24. mars kl. 15.00. Dagsskrá sambært lógum felagsins, broyting í viðtøkum felagsins, herundir broyting í viðtøkum um atkvøðugreiðslu samb. grein 10, límur hevur eina atkvøðu fyri hvørjar fimm bilar, grein 14, eftirstøða í límagjaldi skal hækkast.

Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur kl. 15.30 sama dag.

**Nevndin**

Fyribilsstørv

# Frítíðaravloysarar
## Fyrisitingin

Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum til at avloysa í fyrisitingini o.a. á SL í summar, frá umleið fyrst í mai til seinast í september.
Talan er um avloysarar til høvuðsfyrisitingina, upplýsingartænastuna á Farstøðini og á verkstaðnum á Hjalla.

**Uppgávur á høvuðsfyrisitingini**
Høvuðsuppgávan hjá høvuðsfyrisitingini er at veita eina úrslitagóða fyrisiting, herundir tryggja samskipan og menning.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Leiðsla
- Framleiðslustýring
- Fíggjarstýring
- Starvsfólkaumsiting
- KT-umsiting

**Uppgávur á rutuupplýsingini**
Høvuðsuppgávan hjá rutuupplýsingini er at tryggja eina skjóta ogt rætta upplýsing um ferðaætlanina.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Umstilling til deildir
- Veita upplýsing til tey ferðandi
- Taka ímóti bíleggingum
- Vakt eftir vanliga arbeiðstíð

***Førleikakrøv***
- Skrivstovuútbúgving e.l.
- Góðan kunnleika til EDV
- Duga væl at málbera seg á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap og vera kundavinarligur

**Uppgávur á SL-Verkstaðnum**
Høvuðsuppgávan hjá bilverkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna tekniska viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni.

Viðlíkahaldið fevnir um 15 stórar lastbilar, 11 stórar bussar, 4 vørubilar, 25 trailaralastir og 21 trukkar.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bil-eftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

***Førleikakrøv***
- Lastbilmekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi rakstri av lastbilum og bussum
- Góðan røkjuskap og vera kundavinarligur

**Løn og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av próvskjølum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2001.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara

Tlf. 343000 ella e-mail: pah@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** Mazda 626 2.0TDI ST.CAR GLX
**Árg.:** 1999

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú. Avtala um at síggja bilin kann gerast við deild okkara í Klaksvík.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Ólavur Samson
Tlf. 456190 - Fax nr. 456527

# Tvøroyrar Sosialdemokratiska felag

Lýst verður til aðalfund mánakvøldið 26. mars. Tíð og stað verður lýst nærri.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**